

*Hóast Regin Petersen – sum her er sloppin inn um H71-verjuna – aftur er tøkur saman við Damir Oros, so var tað ikki nóg mikið hjá KÍF leygardagin*

## Pólverskir beiggjar á Toftum

B68 hevur til komandi kappingár tryggjað sær tilgongd av teimum báðum pólverjunum, Jacek og Tomasz Przybylski.

Teir báðir eru brøður, og hava undan hesum eisini roynt seg í føroyskum fótbólti. Her hevur Tomasz tær drúgvaru royndirnar, tí síðani 1998 hevur hann verið fastur fúsur á miðvøllinum hjá LÍF. At hann soleiðis nú skal royna seg á sætta ári í Føroyum merkir eisini, at hann ikki vigar nakað á útlendingakvotuni hjá toftamonnum.

Jacek var part av árinum í fjør í málinum hjá GÍ, men seinstu dystirnar var hann ikki við í hópinum yvirhøvur. Hetta tykist tó ikki hava tikið mótið frá málverjanum, sum annars hevur fleiri ára royndir í fremstu pólsku deildini at vísa á, og verður tað soleiðis hann, sum kemur at verja málið hjá B68. Her hevði B68 annars í Albert Sævarsson besta málverjan í føroysku kappingini í fjør, men av privatum ávum er hann nú farin aftur til Íslands.

**-jm**

H71-KÍF 27-22 (13-13):

# Klárt til finaluna

**Hoyvíkingar avpussaðu sjálvsálitið, tá teir í upphitingini til steypafinaluna vunnu ein hampuliga tryggan sigur á kollfirðingum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri hoyvíkingar hevur stóra hendingin hetta kappingarárið verið steypakappingin, har liðið eftir sigrar á grannunum báðum í høvuðsstaðnum hevur vunnið seg fram til finaludystin, sum verður móti StÍF komandi vikuskifti.

Tað er tó eisini nakað, sum eitur landskapping, og her hevur fyri tað mesta gingið minni væl hjá H71. Undan leygardagin hevði talan bara verið um ein sigur – móti Kyndli – og skuldi nøkur vón vera fyri at klintra nakað upp frá botnsessinum, sum liðið hevur verið á, so var kravið ein sigur á kollfirðingum.

### Avgerandi útvísing

Tað bendi tó leingi á, at um talan skuldi gerast um tvey stig, so skuldi tað í øllum førum stríðast hart fyri hesum. Við Damir Oros aftur á liðnum hava kollfirðingarnir fingið hart saknaðu skothóttanina aftur, og tá Regin Petersen so eisini er komin fyri seg, so hevr KÍF í nógvar mátar eitt lið, sum kann órógva størri og sterkari lið enn hoyvíkingar. Nakað sum teir eisini sýndu seinasta vikuskifti.

Men tað leikaði sera javnt á hesa fyrstu løtuna. Hóast hoyvíkingarnir kanska lógu nakað undir leikliga, so hingur teir alla tíðina væl við í dystinum. Ikki minst tí Bjarni Arnason í málinum sýndi, at hóast hann hevur ein landsliðsmálverja at kappast við, so ætlar eisini hann sær nakað av spælitíð.

Í álopspartinum megnaðu teir eisini fleiri ferðir at slíta seg ígjøgnum verjuna hjá KÍF, sum ofta lat stór hol standa eftir, og tískil oftani kom upp á millumhond. Og móti endanum av fyrra hálvleiki fekk KÍF eisini eina revsing fyri hetta. Ein revsing, sum kanska var avgerandi løtan í dystinum.

Halgir Dahl Olesen breyt einsamallur ígjøgnum verjuna, og tá Mirko Milinkovic skuldi steðga honum, var jugoslavin ov seinur. Úrslitið varð, at hann krøkti armin hjá Halgiri, og so var bert ein vegur, og tað var reyða kortið frá dómarunum.

Uttan vanliga spælskiparan var greitt, at KÍF fór at fáa tað tungt, men teir megnaðu so at verja borg tað, sum eftir var, av fyrra hálvleiki.

Eftir steðgin stóð tó skjótt greitt, at hoyvíkingarnir ætlaðu sær avstað. Serliga verjuparturin á liðnum riggaði nú til fulnar, soleiðis at mótstøðumenninir ofta noyddust at royna seg við skotum útifrá, og tey høvdu bæði Leiv og Bjarni oftani tamarhald á.

Eitt glopp varð skapt alt fyri eitt, og so ráddi bara um at halda fast um hetta. Ein uppgáva, sum hoyvíkingarnir megnaðu uttan stórvegis hóvasták, og einki er at ivast í, at lagið var av tí besta, tá dómararnir høvdu bríkslað fyri seinastu ferð. Liðið hevði loksins fingið ein sigur afturat í landskappingini, og ikki minst mann moralski týdningurin av einum sigri vera stórur, nú steypafinalan stendur fyri framman.

### Fleiri streingir

Spurningurin er so, í hvønn mun hoyvíkingarnir fara at gera um seg í finaluni. Bara tað at liðið er komið somikið langt, verður frá flestu síðum roknað sum ein sensatión, og júst strandingar hava ofta havt eitt sera gott tak á H71.

Hinvegin skal tað á ongan hátt setast niður á liðið. Teir hava vunnið á báðum oddaliðunum á vegnum til finaludystin, og hóast talan ikki er um sama kvika hondbóltin, sum strandingar ofta hava borgað fyri, so hevur liðið avgjørt sínar styrkir.

Tann størsta av hesum er kanska stríðsviljin, sum serliga Kyndil hevur kent sviðan av í ár, og so hevur liðið eisini nakrar einstaklingar, sum kunnu eina rúgvu á vøllinum. Eisini breiddin á liðnum er stór, har fleiri ungir leikarar royna at troka seg framat, umframt at Bárður Brimvík nú eisini er tøkur. So alt í alt er einki sum bendir á, at strandingar skulu fáa nakran lættan dyst, men tað munnu teir hinvegin heldur ikki rokna við.

Kollfirðingar fingu so ikki nakað burturúr hesaferð, og einki er at ivast í, at teir munnu iðra seg um hetta. Ikki minst tí teir við einum sigri kundu lopið bukk um VÍF á stigatalvuni. Tað megnaðu teir so ikki hesaferð, og tey bæði næstu umførini er einki at ivast í, at liðið sleppur at standa sína roynd. Tá skulu teir nevnliga royna seg móti bæði Neistanum og Kyndli, og so er spurningurin, hvørt teir eisini megna at órógva hesi bæði.

### Dysturin í tølum

**H71-KÍF 27-22 (13-13)**
Málskjúttar
H71: Heini Bendtsen 7, Henrik Gerster 5(2), Tróndur Vatnhamar 3, Jákup á Borg 3, Halgir Dahl Olesen 2, Niels Viggo Niclassen 2, Olaf Vestergaard 2, Bárður Brimvík 2, Eyðun R. Jensen 1
KÍF: Damir Oros 11(4), Petur Martin Poulsen 3, Regin Petersen 3, Gert Hansen 2, Teitur Joensen 2, Rógvi Weihe 1
Brotskøst: H71 2, KÍF 5
Útvísingar: H71 7, KÍF 3
Diskvalifikatión: KÍF 1 (Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Stjørnuni: Karstin Joensen & Kristian Joensen. Hava innan rekord-tíð ment seg til eitt av stinnastu dómarapørunum í landinum, og kanska iðra teir seg eitt sindur um, at júst Stjørnan skal verða annar parturin av kvinnufinaluni nú komandi vikuskiftið.



Kyndil-Neistin 16-18 (6-10):

# Jøvn grannauppgerð í Havn

**Dysturin millum bestu kvinnuliðini hjá havnarfeløgunum báðum, Kyndil og Neistanum, gjørdist nógv javnari enn tey flestu høvdu væntað**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*



*Kyndil gav Neistanum óvæntaða harða mótstøðu, og tær munnu helst iðra seg um, at tað ikki megnaðist at skapa eina ordans sensatión*

Tað hevur verið rættuliga misjavnt, hvussu tað hevur hilnast hjá havnarfeløgunum báðum í bestu kvinnudeildini í ár. Neistin hevur verið við í oddastríðnum, men møguleikin fyri meistaraheitinum er langt síðani fokin. Hjá Kyndli hevur árið roynst stak illa, og liðið liggur niðast á stigatalvuni við bert tí eina stiginum. Av somu orsøk høvdu tey flestu óivað væntað ein tryggan sigur til Neistan, tá ið grannauppgerð var í høllini á Hálsi sunnudagin.

### Styrkt heimalið

Kyndlaliðið hevði fingið kærkomnan styrk til dystin sunnudagin. Toppskjúttin seinastu mongu árini, Lotte Sørensen, var við aftur eftir drúgvan skaða, og haraftur-at var danska Sabine Frølund í hópinum, eftir at hon júst er komin aftur til klettarnar.

Tær grønu byrjaðu eisini væl, og Kyndil hevði leiðsluna fyrstu løtuna. Serliga tóktist verjan hjá Kyndli stinn, og saman við einari vælleikandi Fríðu Petersen í málinum syrgdu tær fyri, at tær bláu úr Neistanum høvdu stórar trupulleikar í byrjanini av dystinum.

Tá komið var um miðjan fyrra hálvleik gjørdi Neistin tó ein vørr og skeyt ikki færri enn fimm mál í slag, soleiðis at liðið fór frá at verða eitt mál afturút til at verða á odda við fýra málum! Hesa løtuna var tað, sum um Neistin fekk verjuna at virka, og tað líkasum tók broddin av álopsspælinum hjá Kyndli. Av somu orsøk hevði Neistin eina fýramáls leiðslu, 10-6, tá ið komið var til hálvleiks.

### Lotte kemur í gongd

Í seinna hálvleiki kom spenningur í aftur. Orsøkin til hetta var fyrst og fremst, at Lotte Sørensen hjá Kyndli fekk gongd á kanónina, og í hinum endanum hevði Neistan stórar trupulleikar við at umseta kjansir til mál. Antin bjargaði Fríða í málinum hjá Kyndli, ella vóru skotini hjá teimum bláu ikki nóg neyv og fór út um málrammuna.

Bert fimm minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, tá hevði Kyndil minkað um munin, so at Neistin bert var á odda við einum máli. Neistin økti aftur við trimum málum á rað, men so gjørdi Kyndil aftur tað sama, so at støðan var 14-13 til Neistan, og bert tíggju minuttir vóru eftir at leika.

Tað skal nevnast, at Kyndil mansvardi Simonu Dzikgyte, meðan Neistin mansvardi Lotte Sørensen. Hetta gjørdi at álopsspælið hjá báðum liðum bleiv rættiliga stressað, og tískil vóru rættuliga nógvir óneyðugir feilir framdir av báðum pørtum.

Sjálvt um báðar blivu mansvardar, dugdu tær tó at blanda seg upp í spælið, og eftir at Kyndil, sum áðurnevnt, hevði minkað til 13-14, vísti Simona av álvara sína styrki og skeyt trý mál á rað, so at Neistin kom á odda 17-13. Bert fimm minuttir vóru eftir at leika, og dysturin tóktist nú at verða avgjørdur, men Lotte Sørensen vildi tað øðrvísi. Hon minkaði um munin tríggjar ferðir á rað, so at støðan var 16-17 og ein minuttur eftir at leika. Eitt av hesum trimum málunum hjá Lotte var eitt gott dømi um nógv feilirnar í dystinum. Linda á Dunga í neistamálinum og Marjun Tróndarson misskiltu hvørja aðra, tá ið fyrrnevnda skuldi senda bóltin í spæl, og bólturin endaði beint í føvninginum á Lotte, sum úr 15 metra fjarstøðu kundi kasta bóltin í einum bleytum boga upp um Linda í málinum og í netið. Tíbetur fyri neistakvinnur og tíverri fyri kyndilskvinnur eydnaðist tað Lív Sørensen hjá Neistanum at skora í næsta álopinum og harvið tryggja Neistanum bæði stigini.

### Tvær stinnar verjur

Samanumtikið kann sigast um dystin sunnudagin, at talan var um ein spennandi dyst, har áskoðararnir sóu tvær stinnar verjur, ið stóðu sterkt í myndini. Hinvegin høvdu bæði liðini trupulleikar av at spæla seg til upplagdar málmøguleikar, og dúvaðu tískil upp á kanónirnar hjá ávíkavist Simonu Dzikgyte og Lotte Sørensen. Eisini Lina hjá Neistanum hevði nøkur góð skot. Skal nakar annar nevnast burtur úr rúgvuni, má tað verða Fríða í málinum hjá Kyndli, ið hevði fleiri góðar bjargingar. Málverjarnir báðir hjá Neistanum, Helena Dam Poulsen og Linda á Dunga, royndust eisini væl, og eitt gott dømi um hetta er, at tað ikki eydnaðist Kyndli at skora upp á nakað av sínum trimum brotskøstum í dystinum!

Eftir stigatalvuni at døma skuldi munurin á liðunum báðum verið størri enn hann var sunnudagin, men tað eru tekin um, at Kyndil er við at koma eitt sindur fyri seg. Styrkurin í Lotte Sørensen og Sabine Frølund er kærkomin, og tær báðar kunnu verða við til at lyfta unga kyndlaliðið, ið uttan iva kann geva fleiri av hinum liðunum harða mótstøðu.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Neistin 16-18 (6-10)**
**Kyndil:** Lotte Sørensen 7, Annika Thomsen 2, Anja Heinadóttir 2, Randi Wardum 2, Ann-Mari Vang 1, Jensia Kjærbæk 1, Sabine Frølund 1
**Neistin:** Simona Dzikgyte 7 (2), Lina Andrikgyte 5, Lív Sørensen 4, Ása á Neystabø 2,
**Brotskøst:**
Kyndil 3(0) Neistin 3(2)
**Útvísingar:**
Kyndil 5, Neistin 4
**Dómarar:** Kári Hansen og Trygvi Mortensen: Komu væl frá dystinum.

StÍF-VÍF 18-29 (9-16):

# Stórsigur uttan týdning

**VÍF vann tryggan sigur á StÍF, men stórt meira enn bronsumerki kunnu stigini neyvan brúkast til**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kvinnurnar hjá VÍF vóru sunnudagin á vitjan inni á Skála, har StÍF fyri setninginum, sum skuldi avgreiðast.

Undan dystinumv ar tað ikki tann stóri spenningurin um, hvat liðið mundi fara avstað við sigrinum, og dysturin bendi heldur ongan tíð tann vegin, at nakar serligur spenningur skuldi verða. VÍF dróg alt fyri eitt frá heimaliðnum, og so var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki bendi eisini á, at talan skuldi gerast um rættiliga stórsigur, tá VÍF eitt skifti var á odda 20-10, men so varð ferðin sett niður, so heimaliðið eisini fekk eitt orð at siga. Nær nøkrum stigi komu tær tó ongantíð, og VÍF kundi tí seta enn tvey stig inn á kontina.

Akkurát hvat hesi stigini skulu nýtast til, tykist tó vera eitt sindur óvist. Sum er, so tykist spurningurin um gullið bert vera eitt mál millum VB og Stjørnuna, og so má VÍF taka til takkar við at spæla triðju violin. Her kann Neistin framvegis órógva nakað, so hóast alt mundu stigini hjá VÍF vera neyðug, men tað mundu nú ikki vera bronsumerkini, sum tær høvdu í huganum, tá tær tíðliga í heyst fóru undir fyrstu venjingarnar.



### Dysturin í tølum

**StÍF-VÍF 18-29 (9-16)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Paula B. Høgnesen 6(3), Milica Ergic 4, Sunfríð B. Jacobsen 3(2), Poula D. Olsen 2, Rebekka Justinussen 1, Ninna K. Jakobsen 1, Anna B. Danielsen 1
**VÍF:** Sóley Mikkelsen 7(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 7, Irina Radovici 6, Ioana Rápa 5(1), Jacklin Durhuus 2, Fríða Marjunardóttir 1, Eydna Joensen1
**Brotskøst:** StÍF 6, VÍF 5
**Útvísingar:** StÍF 5, VÍF 3
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum.